UTTAN ÚR HEIMI

**Klóku høvdini rýma**

Tey seinastu árini eru umleið 50.000 letlendingar fluttir av landinum. Talan er serliga um fólk við útbúgving, og tað hevur havt við sær, at tørvurin á fólki við útbúgving er stórur.

Letlendski forsetin, Vaira Vike-Freiberga, sum vitjaði í Finnlandi í síðstu viku, sigur við blaðið Heldingin Sanomat, at myndugleikarnir vilja ikki forða fólki at flyta, tí tað hava tey fullan rætt til. Hon ásannar, at tað er sera óheppið fyri letlendska samfelagið, at fólk við útbúgving flyta burtur, og at teir politisku myndugleikarnir mugu taka stig fyri at forða gongdini. Tað skal gerast við eftirútbúgving, so letlendingar kunnu átaka sær tær uppgávur, sum nútíðin krevur, sigur hon.

Vaira Vike-Freiberga og finsti starvsbróður hennara, Tarja Halonen, verða báðar nevndar sum evni til aðalskrivarastarvið í ST, tá Kofi Annan fer frá á nýggjárinum. Á tíðindafundi í Helsingfors vórðu tær spurdar, um tær høvdu tosað um, hvør teirra skal lata seg stilla upp.

- So langt eru vit ikki komnar enn, svaraði Vaira Vike-Freiberga brosandi.

**Mamman fær endurgjald**

Myndugleikarnir í Kina viðganga nú, at løgreglan hevði ábyrgdina av, at ein 15 ára gamal drongur doyði, meðan hann var í varðveitslu hjá løgregluni.

Tann15 ára gamli bleiv tikin í sambandi við ófriðin í høvuðsstaðnum Beijing í 1989. Síðani hevur mamma hansara ligið í stríði við myndugleikarnar fyri at fáa teir at viðganga, at teir høvdu ábyrgdina av, at drongurin doyði. Nú hava myndugleikarnir slakað, og teir hava samstundis kunngjørt, at mamman fær 50.000 krónur í endurgjaldi.

Eingin veit við vissu, hvussu mong lótu lív, tá kinesiski herurin legði upp í mótmælini á Himmalska Friðartorginum í Beijing í 1989, har studentar og onnur kravdu demokrati. Eygleiðarar halda ikki avgerðina hjá myndugleikunum at játta mammu tann 15 ára gamla endurgjald vera eitt tekin um, at onnur fáa tað sama.

**Koyrið hann frá!**

Yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda mælir nú fólkinum og herinum í Pakistan til at koyra Pervez Musharaf, forseta frá.

Áheitanin kemur frá varaleiðaranum í al-Qaeda, egyptiska læknanum Ayman al-Zawahiri, og stendur á einari pakistanskari heimasíðu. Har verður Musharaf lýstur sum svíkjari, tí hann er gingin við til at beina fyri muslimum í Pakistan og Afghanistan.

Pakistanski forsetin er ein av teimum trúgvu stuðlunum hjá USA, og hann hevur fleiri ferðir lovað at herða bardagan ímóti al-Qaeda og Taliban. Millum annað hevur hann sent pakistanskar herdeildir til markið ímillum tey bæði londini, har tær hava hjálpt amerikanarunum at jagstra læimir í al-Qaeda.

**Funnu lík í kufferti**

Tann 23. januar hvarv tann 20 ára gamla Banaz Mahmod Babakir Agha í London, og um vikuskiftið fann løgreglan líkið av henni í einum kufferti í býnum Birmingham.

Tann 20 ára gamla kvinnan var muslimur og gift við einum muslimi, men í fjør gjørdi hon av at rýma úr hjúnarlagnum. Løgreglan fekk illgruna um, at okkurt álvarssamt kundi vera hent henni, og tað vísti seg eisini at vera rætt.

Løgreglan í Birmingham heldur, at kvinnan gjørdist offur fyri einum sokallaðum ærudrápi. Ein 29 ára gamal maður er tikin í sambandi við drápið, men løgreglan vil ikki siga, hvat samband hann hevði við kvinnuna. Tað er tó greitt, at talan er ikki um mann hennara.

Bæði í Danmark og Svøríki eru dømi um ærudráp, har muslimskar kvinnur eru vorðnar myrdar, tí tær valdu sær annan hjúnarfelags enn tann, sum skyldfólk teirra høvdu valt teimum.

# Tutu og de Klerk keglast

**Seinasti hvíti forsetin í Suðurafrika, F. W. de Klerk, og tann kendi biskuppurin Desmond Tutu eru farnir at keglast um skiftið frá apartheid til demokrati.**





*Destmond Tutu og Frederik W. de Klerk, sum tók seg úr politikki í 1997*

SUÐURAFRIKA

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Tað byrjaði í síðstu viku, tá Desmond Tutu vildi vera við, at tey hvítu hava framvegis ikki skilt, hvussu torført tað var hjá tí svarta meirilutanum at at fyrigeva teimum hvítu og at gloyma ræðuleikarnar hjá apartheidstýrinum. Samstundis vísti hann á, at mong svørt eru sera vónsvikin av, at fleiri hvít, sum fóru illa við teimum svørtu, sleppa undan revsing.

Í gjár fekk Desmond Tutu svar. Í einari blaðgrein skrivar tann seinasti hvíti forsetin í Suðurafrika, F. W. de Klerk, at tað var heldur ikki lætt hjá teimum hvítu at lata valdið frá sær.

- Tað kravdi stórt dirvi at vinna á óttanum og at hava álit á sínum fyrrverandi fíggindum, skrivar de Klerk millum annað og spyr, um tíðin ikki er komin, til at tey svørtu viðurkenna tað, sum tey hvítu hava gjørt fyri Suðurafrika.

Tá kom sum ein bumba, tá de Klerk í februar í 1990 lat sín harðasta mótstøðumann, Nelson Mandela, sleppa úr fongslinum, sum hann hevði sitið í í 27 ár. Trý ár seinni fingu teir báðir friðarheiðurslønina hjá Nobel. Mandela hevur róst de Klerk fyri at hava forðað fyri borgarakríggi, og teir nýggju leiðararnir svaraðu aftur við at geva nógvum hvítum grið, sjálvt um teir viðgingu seg sekar í fleiri brotsverkum ímóti teimum svørtu.

# Tingast um frið í Darfur

**Innan 48 rímar fæst at vita, um tað plágaða fólkið í Darfur fær frið.**




*Í gjár gingu fólk kravgngu í Washington við kravi um frið í Darfur. Fyrireikararnir ætla, at George W. Bush, forseti, skal fáa eina millión postkort við áheitan um at fáa frið í lag.*

FRIÐARTINGINGAR

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Afrikanski Eindarfelagsskapurin AU hevur givið samráðingarmonnunum hjá sudansku stjórnini og uppreistrarmonnunum í landspartinum Darfur 48 tímar til at semjast um frið.

Eftir stórt altjóða trýst hevur stjórnin í Khartoum slakað, og í morgun vóru samráðingarmenninir hjá stjórnini til reiðar at skriva undir eitt 85 síður stórt semingsuppskot hjá AU. Men umboðsmenninir hjá uppreistrarfelagsskapunum vildu ikki skriva undir, tí teir hildu ikki, at uppskotið gekk teimum á møti.

- Vit hava steðgað klokkuni, so partarnir fáa 48 tímar afturat til at semjast, segði samráðingarleiðarin á AU, Salim Ahmed Salim.

Sudanska stjórnin hevur játtað at taka vápnini frá teimum tiltiknu drápsmannaliðunum Janjaweed, sum hava herjað Darfur. Tað sama er galdandi fyri tveir uppreistrarfelagsskapir, men sum skilst hava teir kravt, at teirra menn skulu gerast partur av sudanska stjórnarherinum.

USA hevur lagt stórt trýst á Sudan fyri at fáa frið í Darfur, og George W. Bush, forseti, hevur fyrr sagt, at NATO eigur at senda hermenn hagar, gerst tað neyðugt.

Fleiri hundraðtúsund fólk hava latið lív í ófriðinum í Darfur, og milliónir eru flýdd frá húsi og heimi og búgva nú í flóttafólkalegum í Sudan og grannalandinum Tjad. Herfyri ávaraði ST um, at fleiri túsund kunnu doyggja í hungri, fáa tey ikki hjálp uttaneftir.